# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Jógvan Tróndheim 80 ár



Sunnudagin 14. september fylti Jógvan Ferdin Tróndheim í Klaksvík 80 ár. Jógvan hevur mest sum alla sína tíð havt prentstovu og handil við skrivi- og roknimaskinum og prentlutum.

Jógvan er ættaður úr Leirvík. Foreldrini vóru Maria fødd Samuelsen og ættað úr Leirvík og Jóhan Jákup Tróndheim, sum var ættaður úr Norðragøtu. Jógvan vaks upp á Stongunum í Klaksvík hjá Lisu og Eliseusi Jacobsen. Hon var fødd Toftegaard og ættað úr Fuglafirði, og hann var av Syðradali. Umframt Jógvan uppfostraðu tey Maud Heinesen (1936-2005). Tey bæði – Jógvan og Maud – vóru systkinabørn. Lisa hevði sum ung verið í húsinum við Keldu í Leirvík, sum Maria, mamma Jógvan, og Anna, mamma Maud, vóru ættaðar úr.

Jógvan var blaðungur, tá ið hann fór at arbeiða hjá Eliesari Poulsen og mammubeiggjanum, Theodori við Keldu, sum áttu prentstovuna og bókbindaríið Føroyabók og heilsøluna Rona og bókhaldsvirki, sum menti serliga føroyska bókhaldsskipan. Virkið helt til á Vágsheygnum, har Gigga og Theodor við Keldu búðu, áðrenn tey fluttu norður á Garðar.

Eitt stutt skifti nam Jógvan sær kunnleika til fakið á skúla í Keypmannahavn. Tá ið Eliesar og Theodor góvust við hesum virkseminum, gjørdist tað til trý sjálvstøðug virki. Heilsøluni helt Møller Jensen, sum var giftur mostur Jógvan, Trinu, fram við. Bókhaldsvirkið gjørdist partur av virkseminum hjá Dániali Nielsen, og Jógvan helt fram við prentstovuni og handlinum. Hansara partur av virkinum flutti í 1950 norður í kjallaran hjá Lisu og Eliseusi, og har hevur Jógvan arbeitt síðani. Hann hevur fingist við smáar prentlutir, bókhald og handil, har tað eitt nú bar til at keypa skrivstovuútgerð. Jógvan arbeiddi í sama arbeiðsplássi inntil fyri einum tveimum árum síðani. Viðhvørt hevði hann tvey og aðrar tíðir eitt fólk afturat sær.

Jógvan giftist 28. oktober í 1950 við Thomasiu fødd Justinussen og ættað úr Árnafirði. Foreldur hennara vóru Gertrud og Ísak Justinussen. Hann var úr Árnafirði og hon av Stongunum í Klaksvík. Mása gjørdist tíðliga móðurloysingur og vaks upp hjá mostur síni Marit og Reinholdi Jacobsen, sum var ættaður úr Fuglafirði.

Mása og Jógvan búsettust á Stongunum, har sum Jógvan var vaksin upp. Børnini hjá Másu og Jógvani eru Gerhard (1953), Elfinn (1955), Maria (1963) og Eileen (1971). Tey búgva øll í Klaksvík. Jógvan eigur tíggju abbabørn og trý langabbabørn.

Jógvan, sum er fryntligur og fyrikomandi, hoyrir til tey stillu í landinum. Hann hevur verið ógvuliga trúgvur í samkomuni í Betesda, har hann í nógvar vetrar var við til at hava bíbliutímar fyri børnum. Longu í 1946 var hann við í ferðalagnum, tá ið manskór úr Betesda umborð á skonnartini Skálanes vitjaði í Keypmannahavn. Tað var tá, at pláturnar við manskórinum, sum gjørdust kendar um alt landið og onkuntíð enn eru at hoyra, vórðu tiknar upp.

Umframt trúfesti í samkomuni í Betesda hevur Jógvan í nógvar vetrar – og tað ger hann framvegis – saman við øðrum verið eitt gerandiskvøld um vikuna og vitjað í samkomuni Saron á Viðareiði.

Frítíð og arbeiði hava mest sum verið eitt, og tað er ikki frítt, at Jógvan hevur brúkt síni góðu evni at yrkja og umseta. Bátur var í húsinum, og tá ið møguleiki var fyri tí, plagdi Jógvani at dáma væl at vera á floti saman við dreingjunum.

Jógvan var frá tí fyrsta uppi í felagnum Javni, og frá 1975 og fram til 1988 var hann limur í skúlanevndini í Klaksvík. Hann var valdur á tjóðveldislistanum.

80 ára føðingardagurin varð hildin á Klaksvíkar Sjómansheimi sunnukvøldið.

J

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæri maður mín, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Joen Jacob Olsen**
(Jakku á Dalinum)

doyði og fór til gravar.
Tøkk til Absalon Matras og Hanus Simonsen, prest.
Tøkk fyri vakran sang, horn- og orgulspæl.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Emmaus og tøkk til tykkum øll, ið komu at fylgja.

**Kathrina og børnini við familju**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæri maður, pápi, abbi og langabbi

**Karl Olaus Dam**
Sumba

andaðist, og varð jarðaður.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til kirkjuna og missiónshúsið.
Tøkk til øll tykkum, ið vóru um hann ta síðstu tíðina, og tøkk til tykkum, ið fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Helna Dam**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Kristin Bærendsen, Argir**, sonur Sigurd og Sólvá Bærendsen í Skopun andaðist sunnudagin, 27 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst sienni.

**Dagurin**
**18. august. Agapetus.**
Deyður umleið ár 300. Ein 15 ára gamal drongur, sum var tikin av døgum fyri kristnu trúgv sína.

# Jegvan Elis Danielsen 70 år



**70 års fødselsdag:** Jegvan Elis Danielsen, Alfehøjvej 66, 4684 Holmegaard, fylder onsdag den 24. september 2008 70 år.

Jegvan stammer, som navnet antyder, fra Færøerne. Jegvan har fået sin uddannelse som kok på de store verdenshave, som han startede med at sejle på allerede som 15-årig.

Han har med stor succes sammen med sin hustru i en lang årrække drevet Hotel Bogø Kro & Gæstgivergaard, hvortil gæsterne kom langvejs fra for at nyde den gode mad. Naboejendommen blev købt til anneks og omdannet til hotelværelser, samtidig har han været vært på forsamlingshuset og en overgang forpagtet Skovpavillonen på Bogø.

Senere gjorde diabetesen det nødvendigt for den aktive kok at skære lidt ned på aktiviteterne, hvorefter bopælen blev Vordingborg. For tolv år siden oplevede Jegvan den store sorg at miste sin hustru, Dinna, efter længere tids sygdom.

Jegvan nyder nu pensionisttilværelsen i Fensmark med flere aktive fritidsinteresser. Dagen bliver fejret i hjemmet.